Kommunufelagið

Mentamálaráðið
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 TÓRSHAVN

Dagfesting
3. oktober 2018

Okkara j.nr.
18/02973-5

Málsviðgeri
Eyðun Christiansen

Tygara j.nr.
18/00156-26

***Viðv. uppskoti til løgtingslóg um heilsuhjálparaútbúgving, heilsurøktaraútbúgving og pedagoghjálparaútbúgving***

Mentamálaráðið hevur 17. september 2018 sent Kommunufelagnum uppskot til løgtingslóg um heilsuhjálparaútbúgving, heilsurøktaraútbúgving og pedagoghjálparaútbúgving til hoyringar. Hoyringsfreistin er 2. oktober 2018.

**Bakgrund**
Í viðmerkingunum til uppskotið stendur, at orsøkin til lógaruppskotið er, at samgongan hevur sett sær fyri at menna námsfrøðiliga virksemið á dagstovna-, forskúla-, skúla- og almannaøkinum. Harumframt er útbúgvingin til hjálparfólk partur av semjuni frá 14. januar 2018 millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag, har **semja var um at heita á landsstýriskvinnuna í mentamálum um at skipa eina útbúgving til hjálparfólk.**

Í uppriti til landsstýrisfund, dagfest 4. apríl 2018, stendur á leið sami tekstur: "Samgongan hevur í samgonguskjalinum sett sær sum mál at menna dagstovnaøkið. Harumframt er pedagog-hjálpararútbúgving partur av semjuni frá 14. januar 2018 millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag, **har tað stendur, at partarnir eru samdir um at heita á Mentamálaráðið um at stovna eina útbúgving fyri hjálparfólk."**

Kommunufelagið skal gera vart við, at hetta ikki er rætt endurgivið. Í semjuni millum Pedagogfelagið øðrumegin, og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Fíggjarmálaráðið hinumegin, stóð, at **"sáttmálapartarnir eru somuleiðis samdir um, at partarnir saman við MMR umrøða møguleikarnar fyri at seta á stovn eina útbúgving fyri hjálparfólk".**

Í hesum sambandi er neyðugt at nevna, at eingin verulig umrøða hevur verið millum nevndu partar um at seta á stovn eina útbúgving fyri hjálparfólk.

Í uppritinum til landsstýrisfundin 4. apríl 2018 stendur somuleiðis, at ætlanin er at seta arbeiðsbólk við umboðum frá Mentamálaráðnum, Heilsuskúla Føroya, Námsvísindadeildini, Kommunufelagnum og Føroya Pedagogfelag.

Í hesum sambandi er eisini neyðugt at nevna,  at ein slíkur bólkur ongantíð er settur. Hinvegin hava nakrir einstakir fundir verið í Mentamálaráðnum, har ítøkiliga innihaldið í útbúgvingini hevur verið til umrøðu. Men av tí at uppskotið hevði slíkan skund og arbeiðið tískil als ikki var liðugt, var semja um, at Mentamálaráðið einsamalt hevur ábyrgdina av innihaldinum í hesum uppskotinum.

**Viðmerkingar annars**

Tá ið tað í semjuni frá 14. januar 2018 stendur skrivað, at partarnir saman við Mentamálaráðnum umrøða møguleikarnar fyri at seta á stovn eina útbúgving fyri hjálparfólk, so hevur hetta sína orsøk.

Fyri tað fyrsta eiga partarnir yvirskipað at umrøða tørvin á útbúgvingini, longdina av útbúgvingini og í hvønn mun útbúgvingin gevur avriksflutning í mun til aðrar útbúgvingar.

Í øðrum lagi eigur at verða umrøtt, hvussu hesin nýggi fakbólkur ávirkar samansetingina av starvsfólkahópinum á dagstovnaøkinum annars. Í galdandi dagstovnalóg er ásett, at 2/3 av starvsfólkunum skulu vera útbúnir námsfrøðingar og at 1/3 kunnu vera hjálparfólk. Skal henda ásetingin broytast, nú nýggjur fakbólkur við 2 ára útbúgving skal vera á dagstovnaøkinum?

Í triðja lagi er eisini neyðugt at útgreina starvsrættarligu viðurskiftini hjá hesum fakbólki, bæði við atliti at arbeiðsinnihaldi, ábyrgd og lønarviðurskiftum.

**Samanumtikið**

Viðmerkingarnar omanfyri skulu ikki skiljast soleiðis, at felagið er ímóti at fáa sjósett eina útbúgving fyri hjálparfólk. Tvørturímóti metir felagið, sum tað eisini sæst í sáttmálasemjuni frá í januar 2018, at tørvur er á fáa umrøtt, hvussu ein slík útbúgving skal skipast. Nevnda umrøða hevur ikki verið, og tí er talan um eitt uppskot, sum Mentamálaráðið burturav hevur ábyrgdina av.

Hinvegin er Kommunufelagið altíð til reiðar at fara undir eina veruliga umrøðu við viðkomandi partar um at fáa stovnsett ein hjálparfólkaútbúgving.

Vegna
Kommunufelagið

Dennis Holm
Formaður

Eyðun Christiansen
Stjóri